UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 15. mai 2023
J. nr.: 23/10840-2

Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-096/2022 frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, um royndir við restum frá betongi til at kálka jørð

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Hvat vístu royndirnar, sum í 2021 vórðu gjørdar við at brúka restbetong til at kálka jørð við?*

2. *Væntar landsstýrismaðurin, at hetta er ein loysn, sum føroyskir bøndur kunnu brúka til at økja pH-virðið í jørðini og harvið fáa framleitt meira stráfóður við somu ella minni nýtslu av innfluttum kunsttøðum?*

Svarað verður undir einum:
Í 2021 fingu Búnaðarstovan og Umhvørvisstovan fyrispurning um møguleikan at royna at gagnnýta betongrestir sum jarðarbót í slóttuboi, heldur enn at beina tær burtur.

Reinsað betong inniheldur í høvuðsheitum sand og væl av kálki, umframt ymisk sporevni, og hugsanin var, at sandurin og kálkið kundu vera gagnlig jarðarábót í bønum. Eitt av ivamálunum var tó, um eitt nú tungmetall í restunum høvdu skaðiligt árin á umhvørvið. Føroyskt jørðildi, serliga mójørðin, er súrt og hevur ov lágt pH-virði í mun til støðið, ið er ynskiligt til tess at fáa so góðan grasgróður og góða fóðurdygd sum gjørligt. Við at kálka jørðina ber til at hækka pH-virðið til millum 6 og 7, ið er ynskiligt í góðum boi til tess at fáa dygdargott stráfóður.

Á sumri í 2021 vórðu tí fýra teigar upp á góðar 1.000 fermetrar hvør lagdir av til royndarøki at kanna ávirkanina av reinsaðum betongrestum. Lendið varð kannað, áðrenn farið varð undir royndirnar.

Samanumtikið er torført at greina úrslitini, sum eisini væntandi var, tí skulu slíkar royndir vera álítandi, er neyðugt at halda fram við teimum í longri tíðarskeið.

Tað er torført at meta um, hvørt tungmetall eru ein dálkingartrupulleiki útfrá hesi einstøku royndini, tí úrslitini geva ongar greiðar ábendingar. Grassýnini vórðu tikin av líggjaskónum í august 2021. Her kann ein ábending vera um, at árinið frá blandingini við betongrestum, N-P-K og mykjutøðum kann geva orkuríkt stráfóður í mun til turrevnisnøgdina.

Ein einstøk roynd av slíkum slagi yvir eitt so stutt tíðarbil kann kortini ikki nýtast sum grundarlag undir eini støðutakan til, hvørt gagnnýtsla av betongrestum kann gerast ein háttur at fremja ábøtur í slóttuboi.

Um áhugi er frá vinnulívinum fyri framhaldandi kanningum av slíkum slagi, er Búnaðarstovan sum landbúnaðarmyndugleiki áhugað í framhaldandi samstarvi um hetta. Umhvørvisstovan er málsøki hjá øðrum stjórnarráði og má tí svara fyri seg.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 15. mai 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður